gult18 cyan18 magenta18 svart18

ítróttur

Nr. 123 • leygardagur • 30. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo



B36-VB:

# Tey næstfremstu dystast

**B36 og VB eru liðini, sum eru næst GÍ, og hjá báðum er tí umráðandi at vinna sunnudagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tá VB í fjør gjørdist føroyameistari, var tað í Havn, at seinasti og avgerandi dysturin varð leiktur. Á sama hátt vann B36 sítt meistaraheitið í 1997, og tað er eingin loyna, at havnarmenninir droyma um eina endurtøku í ár, tá B63 fer suður at spæla seinasta umfarið.

### Neyðugt við sigrum

Skal hetta gerast veruleiki, er tó neyðugt við sigrum – nógvum sigrum – tí tað tykist als ikki sum um gøtumenn hava hug at líta aftur um bak á sínari ferð.

Tí er einki at ivast í, at B36 fer eftir sigrinum í morgin, og til uppgávuna hava teir at kalla allar mans tøkar. Pól Thorsteinsson spældi móti HB, hóast hann enn merkir til skaðan, og roknað verður fyri vist, at hann verður við móti gomlu liðfeløgunum. Harafturat hava bæði Herbert í Lon Jacobsen og Magni á Lakjuni vant við fullari ferð, eftir at teir hava verið skaddir.

Sostatt situr Piotr Krakowski helst við einum stórum positivum trupulleika undan dystinum. B36 hópurin er kanska hin breiðasti í landinum, og eru allir mans tøkir, mugu fleiri taka til takkar við einum plássi á beinkinum.

Hjá VB er støðan um enn ikki heilt so góð, so nærum. Einasta ivamálið hjá teimum til dystin er Predrag Zivkovic, sum hevur fingið onkran skaða í økslina, og tá vit frættu úr Vági var sera ivasamt, um hann fór at verða tøkur til vikuskiftið.

Hetta er sjálvandi ein smeitur fyri meistararnar, men hinvegin tykist hópurin í ár breiðari enn í fjør, so ivaleyst fer leikandi venjarin at finna upp á onkur ráð, til tess at tippa holið eftir Predrag.

Sostatt tykist talan fara at verða um tvey lið í at kalla sterkastu uppstilling, og í mett eftir seinastu úrslitunum er talan eisini um tvey lið, sum eru sera væl fyri, so útlitini skuldu í øllum førum verið fyri einum góðum fótbóltsdysti.

HB-FS Vágar:

# Trýstið liggur á HB

**Skal HB á nakran hátt fylgja við oddinum, er tvingandi neyðugt við einum sigri á niðasta liðnum, sum tó hevur havt eina ávísa framgongd seinastu dystirnar**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

HB eru favorittar, tá teir sunnudagin fara vestu til Vágarnar, har teir skulu royna seg móti FS Vágum. Hetta kann staðfestast við at líta á stigatalvuna, har liðini bæði stríðast í hvør sínum enda.

Hetta merkir tó á ongan hátt, at vágamenn bara ætla at geva seg yvir, nú sigursvanda felagið kemur á vitjan. Eftir at hava havt sera vánalig úrslit seinastu vikurnar, ressaðust vágamenn nakað um vikuskiftið, og hóast talan eisini varð um tap móti KÍ, so vóru nógvir positivir lutir hjá liðnum at taka við úr tí dystinum.

### Allir tøkir

Venjaraparið hjá vágamonnum, Albert Ellefsen og Jonhard Joensen, tykjast eisini at hava allar mans tøkar til uppgávuna. Birgir Joensen er aftur komin fyri seg, og harumframt hevur felagið nú eisini fingið tveir ungar og evnaríkar leikarar til felagið, eftir at hesir hava verið á Flatlondum í útlegd. Talan er um teir báðar, Hans Boga Ellefsen og Jákup Joensen, men spurningurin er so, um teir vera við frá byrjan.

### Onkrir resta í

Í HB er støðan við fólkinum ikki heilt so góð, sum hon kundi verið. Lið- og spælskiparin, Rúni Nolsøe, fekk reytt kort í dystinum móti B36, og tískil fær hann ikki tikið lut sunnudagin. Harumframt er ivamál um Una Arge. Álopsmaðurin hevur verið sjúkur alla vikuna, og tá vit frættu seinast, var framvegis ivasamt, um hann fór at verða tøkur.

Hóast hendan missin, so eigur HB framvegis at roknast sum greiður favorittur, og í HB munnu tey eisini rokna við einum sigri. Hesin er eisini neyðugur, um liðið so dánt skal kunna fylgja við oddinum, og tað er har, HB aloftast er at finna.

Vágamenn fara tó helst at gera sítt ítarsta, til tess at forkoma HB-vónunum, og eftir at teir hava sýnt eina ávísa framgongd seinnu umførini, tykist spurningurin vera, um tíðin nú er komin, har teir fara at arga okkurt av fremru liðunum.

## Dystir um vikuskiftið:

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 01.07 | B71-GÍ | Eiler Rasmussen |
| 01.07 | B68-KÍ | Suni Johansen |
| 01.07 | FSV-HB | Petur E. Kjærbo |
| 01.07 | B36-VB | Niklas á Líðarenda |
| 01.07 | EB/S-NSÍ | Oddmar Andreasen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 30.06 | Skála-NSÍ | Petur Hans Joensen |
| 30.06 | ÍF-HB | Edvard Højgaard |
| 30.06 | GÍ-LIF | Jonhard Hansen |
| 30.06 | B36-Sumba | Rúni Gaardbo |
| 30.06 | TB-KÍ | Páll Augustinussen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 01.07 | B71-GÍ | Ólavur Weihe |
| 01.07 | B68-KÍ | Dia Lamhauge |
| 01.07 | ÍF-AB | Dan Højgaard |
| 01.07 | B36-VB | Ransins N. Djurhuus |
| 01.07 | TB-Royn | Eyðun Kjærbo |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 30.06 | B68-KÍ | Jógvan A. Jacobsen |
| 30.06 | B71-HB | Hans F. Hansen |
| 30.06 | B36-VB | Erling Eysturoy |

B71-GÍ:

# Setir GÍ aftur met

**Einasta liðið, sum GÍ enn ikki hevur vunnið á í ár eru B71, men nú sleppa sandoyingar eisini at fáa sína roynd móti oddaliðinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

At skriva um gongdina higartil hjá GÍ man tykjast sum ein endurtøka av teimum heilt stóru. Higartil er talan so vorðin um átta sigrar á rað, og spurningurin er so, hvørt talan verður um níggjunda og seinasta liðið, sum noyðist at boyggja seg.

### Kára er úti

Sandoyingar eru nakað skerdir, nú teir taka ímóti gøtumonnum. Móti runavíkingum noyddust bæði Svenning W. Hansen og Kári Nielsen út tíðliga í dystinum, og hvørgin teirra verður tøkur sunnudagin. Ringast stendur til hjá Kára, sum allarhelst hevur brákað okkurt í fótinum, verður sagt av Sandi.

Hetta merkir so helst, at Kári Reynheim noyðist niður á triðju deildar liðið eftir fólki, men harumframt er helst eisini væntandi, at venjarin enn einaferð fer at teljast millum teir á vøllinum.

Í aðrar mátar hava sandoyingar alt fólki tókt, og hóast talan hevur verið um tap í flestu av undanfarnu dystunum, so hava teir í fleiri av hesum prógvað, at teir væl kunnu geva øllum liðunum í landinum ein skarpan gang.

### Á leið hitt sama

Tí fara gøtumenn helst ikki á nakran hátt at taka sær av løttum, tá teir koma suður.

Fólkið tykist vera á leið tað sama, sum í miðvikuni vann á B68, tó at Hans Pauli Petersen nú aftur er tøkur hjá venjaranum.

Roknast skal tí ikki við teimum stóru broytingunum á liðnum. Sámal Joensen er enn ikki tøkur, men burtur sæð frá hesum er alt fólkið til staðar.

Hvørt hetta so verður nóg mikið til at seta enn eitt met, fer sunndagurin at vísa.

gult19 cyan19 magenta19 svart19



# Stórt mannfall á Toftum

**Allan Joensen er komin fyri seg aftur eftir vøddaskaðan, og tað vil siga, at klaksvíkingar hava alt fólkið tókt, tá teir koma á Svangaskarð**



KÍ fer á Svangaskarð í morgin. Talan er um áhugaverda uppgerð, tí hjá báðum liðunum hevur tað gingið nógv upp og niður. Viðhvørt hava tey sýnt góð avrik, og í øðrum dystum hevur tað gingið alt annað enn væl.

Toftamenn vístu góðan hugburð í Gøtu mikukvøldið, og avrikið var leingi gott. Men so kiksaðu teir, og gøtumenn vóru eirindarleysir.

Stríðið í Gøtu kostaði B68 tvey leikbann. Hans Fróði Hansen og Jákup Eli Olsen vóru eftiransarar frammanfyri Jan Petersen. Teir fingu báðir gult kort, og teir eru báðir leikbannaðir ímóti KÍ. Jan C. Dam, sum hevur verið fastur fúsur í miðverjuni, er langtíðarskaddur. Tað vil við øðrum orðum siga, at Jóannes Jakobsen skipa miðverjuna av nýggjum.

Ungi og evnaríki Jann Ingi Petersen var sera eyðsýndur ímóti GÍ, men hann verður ikki við í morgin. Í gjár fór 10. flokkur í Tofta skúla suðureftir at ferðast, og ungi fótbóltsmaðurin fór avstað saman við floksfeløgunum.

Brasiliumenninir hava spælt lítið í ár. Nú mannfallið hevur verið stórt kann roknast við, at teir allir tríggir fara at fáa møguleikan.

### Allan við aftur

Eftir sigurin á FSV og sigurin í unglingafinaluni hevur fótbóltslagið í Klaksvík fingið eina tonn rætta vegin, og manningarliga eru teir so væl fyri, sum tað ber til. Liðformaðurin, Allan Joensen, hevur verið vøddaskaddur í lærinum í ein mánað. Hann hevur vant við fullari ferð í hesi vikuni og verður við í morgin. Fríðin Ziskason var leikbannaður seinast og er nú tøkur aftur.

Trupulleikin í Klaksvík er nú vallarspurningurin. Í hesi vikuni hava teir havt ein hálvan vøll at venja á, og í næstu viku verður eingin vøllur. Tá verður farið undir at leggja nýggja graslíkisteppið á. Teir rokna við at fara eina ferð til Gøtu at venja, og so er eisini møguleiki at venja á tí partinum av gamla graslíkinum, sum er í grótbrotinum á Viðareiði.

# Eingin fótbóltsskúli er í høvuðsstaðnum

**FSF sigur, at skúlin er húsvillur, men hvørki í B36 og í HB halda tey seg ikki hava skuldina av, at eingin skúli er í Gundadali í ár**

Tey seinastu árini hava frá umleið hálvt triðja hundrað og upp ímóti fýra hundrað børnum verið á fótbóltsskúla í høvuðsstaðnum. Eingin fótbóltsskúli verður í høvuðsstaðnum í ár, og tað eru foreldur og børn sum vera man hørm um.

Í gjár og í dag eru tveir fótbóltsskúlar á skránni. Annar er á Toftum og í Gøtu, og hin er í Vági. Komandi vikuskifti verður fótbóltsskúli í Vágum. Undanfarin ár hevur fótbóltsskúli verið í Klaksvík, men har verður eingin skúli í ár.

80 børn eru á skúlanum í Vági, og 320 børn taka lut í skúlanum á Toftum og í Gøtu. Undanfarin ár hevur skúlin verið á Toftum og í Runavík. Tá hevur luttakaratalið verið nakað lægri, enn tað er í ár. Orsøkin til at luttakaratalið er økt í ár er, at fleiri børn úr høvuðsstaðnum hesa ferð eru á skúlanum í Eysturoy.

Í FSF siga tey seg hava fingið nógvar fyrispurningar um, hví eingin skúli er í Havnini í ár. Tey siga seg avgjørt einki hava ímóti, at skúlin hevði verið í Gundadali, men tey siga, at tað ber ikki til, tí eingi høli eru tøk:

– Í Gundadali eiga bæði HB og B36 stór og sera góð felagshús. Men hesi húsini eru útleigað til brúdleyp og onnur tiltøk, tá fótbóltsskúlin varð settur at vera á skránni. Tað vil siga, at tað eru eingi høli tøk til fótbóltsskúlan. Tí er eingin fótbóltsskúli í høvuðsstaðnum í ár, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF.

Birgir Enghamar er formaður í HB. Hann sigur, at teir hava havt ta fatan, at teir og B36 skuldu skiftast um at hava ábyrgdina av skúlanum.

– Vit høvdu ábyrgdina í fjør. Tað vil siga, at vit løgdu hús til og útvegaðu teir umleið hálvt hundrað venjararnar. Tá FSF setti seg í samband við okkum og boðaði frá, at B36 hevði leigað sítt hús út, var okkara hús útleigað. Vit halda heldur ikki, at vit hava orku at hava ábyrgdina fyri so stórum tiltaki á hvørjum ári, sigur Birgir Enghamar.

Kristian á Neystabø er formaður í B36. Hann sigur seg fegnan vilja hava, at skúli er í Gundadali, men hann heldur ikki, at hansara felag hevur ábyrgdina av, at eingin skúli er har í ár.

– Vit hoyrdu einki frá FSF, og so vendu vit okkum sjálvir til teirra. Teir søgdu, at skúlin skuldi vera hetta vikuskiftið. Tá var okkara hús útleigað, men vit løgdu tað soleiðis til rættis, at skiftirúmini vóru tøk. Tað boðaðu vit FSF frá og søgdu, at tað var í lagi at brúka skiftirúmini, um teir funnu útvegir fyri øðrum hølum at eta í. Vit hoyrdu einki aftur frá FSF, sigur Kristian á Neystabø, sum sigur seg einki kenna til nakra avtalu um, at feløgini skulu hava ábyrgdina annað hvørt ár.

– Um vit komandi ár fáa eitt prej í góðari tíð, so verður fótbóltsskúlin í Gundadali, sigur B36 formaðurin.

### Trupulleikar við vallum

Í FSF siga tey seg rokna við, at skúlin aftur komandi ár verður í Klaksvík. Orsøkin til at eingin skúli er har norðuri í ár er, at teir í hesi vikuni eru farnir undir at taka graslíkið av vøllinum. Tað skal skiftast, tá nýggja teppið er komið á vøllin í Runavík.

Undanfarin ár hevur fótbóltsskúlin í Eysturoy verið á Toftum og í Runavík. Í ár er skúlin á Svangaskarði og í Gøtu. Vøllurin í Runavík er ikki tøkur í løtuni. Nýggja graslíkið er komið á vøllin, men teir eru ikki lidnir við at fáa nógva sandin í vøllin og við at merkja hann.

Skúlin í Vági byrjaði klokkan tíggju í gjáramorgunin. Ætlanin var, at skúlin í Eysturoy eisini skuldi byrja klokkan tíggju, men í lýsing í útvarpinum varð í fyrradagin boðað frá, at børnini skuldu møta klokkan eitt. Orsøkin var tann, at FSF vildi ikki, at skúlin skuldi órógva íslendsku forsetavitjanina, sum fyrrapartin í gjár var í Runavík.

# GÍ setir metið - GÍ setir metið - GÍ setir metið

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | '91 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B71-GÍ | 3-7 | 2-5 | 0-1 | 1-4 | 0-3 | 1-1 | 0-7 | 0-1 | 1-4 | 2-2 | 0-2-8 | 10-35 |
| B68-KÍ | 6-1 | 2-3 | 1-5 | 1-2 | 0-4 | 2-1 | 3-0 | 0-3 | 0-0 | 0-0 | 3-2-5 | 15-19 |
| FSV-HB | 0-2 | - | - | 0-7 | 1-0 | 3-5 | - | - | 2-2 | 0-0 | 1-2-3 | 6-16 |
| B36-VB | 1-2 | 6-1 | 8-2 | 4-0 | 2-1 | 1-2 | - | 2-0 | 3-0 | 2-3 | 6-0-3 | 29-11 |
| EB/S-NSÍ | - | - | - | - | - | - | 2-1 | - | - | - | 1-0-0 | 2-1 |

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 8 | 8 - 0 - 0 | 26 | 8 | 18 | 24 |
| 2 | B36 | 8 | 6 - 1 - 1 | 31 | 5 | 26 | 19 |
| 3 | VB | 8 | 5 - 0 - 3 | 22 | 8 | 14 | 15 |
| 4 | HB | 8 | 4 - 1 - 3 | 15 | 9 | 6 | 13 |
| 5 | KÍ | 8 | 4 - 0 - 4 | 9 | 16 | -7 | 12 |
| 6 | NSÍ | 8 | 3 - 2 - 3 | 9 | 12 | -3 | 11 |
| 7 | B68 | 8 | 3 - 1 - 4 | 15 | 16 | -1 | 10 |
| 8 | EB/Str. | 8 | 2 - 0 - 6 | 8 | 15 | -7 | 6 |
| 9 | B71 | 8 | 1 - 1 - 6 | 6 | 16 | -10 | 4 |
| 10 | FS Vágar | 8 | 1 - 0 - 7 | 6 | 42 | -36 | 3 |

**At døma eftir hagtølunum, er lítið at ivast í, at gøtumenn seta nýtt met sunnudagin. Seinastu tíggju árini hava teir ikki tapt á Sandi.**

HAGTØL
*Jákup Mørk*

Tølini tala fyri seg, verður sagt, men spurningurin er so, um tey frá fortíðini hava nakað at siga, tá farið verður á vøllin.

Undir øllum umstøðum, so kunnu hesi helst geva eina ábending um, hvussu tað vanliga gongst, tá mótstøðuliðini sunnudagin dystast.

Niðanfyri sæst, hvussu hevur gingist, tá hesi hava hitst seinastu tíggju árini.

# Skotin hjá NSÍ er farin avstað aftur

**Í EB/Streymi eru teir væl fyri undan oyggjauppgerðini ímóti teimum av Skálafjørðinum**

Steðgurin hjá skotska álopsspælaranum var stuttur í Runavík. Hann er longu farin avstað aftur. Martin Glancy var nógv plágaður av skaðum stuttu tíðina, sum hann var í NSÍ. Sáttmálin, sum var millum felagið og hann, var í fyrstu atløgu bara galdandi inntil summarsteðgin, og tá skaðar gjørdu, at hann ikki fekk spælt, fór skotin av aftur landinum í hesi vikuni.

Sjúrður Jacobsen er leikbannaður, tá NSÍ í morgin fer til Eiðis. Djóni N. Joensen, sum var leikbannaður, tá teir vóru á Sandi, er tøkur aftur.

Í EB/Streymi er alt fólkið tókt. Eingin er leikbannaður, og undan venjingini í gjárkvøldið var eingin spælari skaddur.